## Spælimenninir á G!

Spælimenninir hjá Kristiani Blak, eru ein tann føroyski bólkurin, sum hevur spælt oftast í útlandinum og, sum hevur selt flest fløgur uttanlanda. Nú verður bólkurin at hoyra á G!.

Nøvnini á G! eru nógv og góð, eitt av teimum er Spælimenninir, og hetta navnið borgar fyri eini framúr uppliving hvørja ferð. Festligi og trøllakendi spælimanstónleikurin kann fáa næstan ein og hvønn í gott lag. Tú kanst trampa, dansa ella hoppa, men illa standa stillur/still, tá hendan orkumaskina setur futt í.

## Sveimandi, droymandi kristin rokkur á G!

Direct Level fer at spæla sín sveimandi og atmosferiska rokktónleik á ársins G! Festivali. Bólkurin gjørdist nummar tvey í Gospel Prixnum í fjør og gjørdi eisini jaliga vart við seg í Prix Føroyum í ár.

Talan er um ein gittarrokkbólk. Gittararnir eru dominerandi í ljóðmyndini, og skapa eina droymandi kenslu. Eina løtu eru dreymarnir stillir og so spakuliga gerast teir villir. Bassur og trummir eru trygga grundin, sum gittararnir hava støðið á. Direct Level er vælsignaður við einum framúr sangara, og røddin hóskar sera væl til stílin. Melodiðirnir hjá bólkinum eru vakrir, og røddin ber løgini.

**nud**




# "Dyr" framsýna á Bryggjuni

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 25. juni lótu Tita Vinther, Astrid Andreasen og Guðrið Poulsen framsýningina, um tey í Danmark rópa "Entré", upp í góðveðrinum á Bryggjuni í. Framsyningin er tann sama sum var partur av Listastevnuni 2002 í Grasagarði. Fitt av fólki var komið saman á Brygguni, tá ið fyrst nýsetti leiðarin á stovninum Helga Hjørvar bjóðaði vælkomin og føroyski umboðsmaðurin í Keypmannahavn, Tryggvi Johansen, síðani ment læt framsýningina upp.

Tita luttekur á framsýningini við vovnum teppum úr kopartráði, syllum, mannahári og rossahári og hetta ymsa tilfar hóskar sera væl til byggilistina í tí framúr vakra, gamla pakkhúsinum.

Astrid framsýnir m.a. sínar væl umtóktu hegrar úr kopartráði, veggteppi úr ull, litografi og silkitrykk og úti í tún standa fuglahúsini og láta. Í Grasagarði vóru tey sett á Tannlæknastovuna, nú eru tey sett á súlu og prýða gráu húsafasaduna.

Har standa eisini betonoyggjarnar hjá Guðrið. Tað gamla Føroyakortið frá 1537, Carta Marina sum Olaus Magnus, biskoppur, teknaði.

Framsýningin er opin til tann 24. juli.


LEYST STARV

SsangYong
www.kollsker.com

**Bilverkstaðið v/H.J. Kollsker Sp/f søkir eftir starvsfólki at byrja 1. september 2005.**

**Arbeiðsuppgávurnar verða:**
· at sýna bilar
· bíleggja eykalutir og uppfylging av hesum
· kundamóttøka
· umvæling av skaðum
· plátusmiður ella hollar royndir innan umvæling av bilum
· fyrikomandi, álítandi, arbeiðssamur og fram um alt vælgjørdur
· fyrimunur um tú kanst hava fleiri bóltar í luftini í senn.

Starvið verður lønt eftir samráðing.

**Førleikakrøv:**
· royndir innan Autotaksskipanina

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 1. august 2005

Bilverkstaðið v/H.J. Kollsker Sp/f · Á Hjalla
Tel +298 311013 · Fax +298 321015

BILVERKSTAÐIÐ

*Bilverkstaðið v/H.J. Kollsker er eitt av størstu plátuverkstøðunum í Føroyum, og er í støðugari menning. Verkstaðið umvælir øll bilmerki og selir og umboðar jeeparnar SsangYong í Føroyum*





Sansir søkja samskipara/ráðgeva

# Tak tær væl av okkara kundum

Ein kampanja skal leggjast til rættis, og ein miðlaætlan skal leggjast fyri sjónvarp, útvarp og bløð. Faroe Islands Tourist Guide og Atlantic Review skulu hava greinar og lýsingar. Eitt útkast skal gerast til faldara, myndir skulu finnast og takast, og týska umsetingin skal fáast til vega.

Mongu og fjølbroyttu uppgávurnar á Sansum krevja ein væl skipaðan og nærlagdan samskipara, sum hevur skil fyri marknaðarføring og eitt gott eyga fyri smálutum. Tað kundi verið tú!

Umfram arbeiði sum samskipari, skal tú vera før/ur fyri at tosa við okkara viðskiftafólk um, hvussu teirra vøra ella tænasta best verður marknaðarførd. Tú skrivar væl føroyskt og samskiftir lættliga á donskum og enskum. Tú hevur eina hægri útbúgving innan sølu og samskifti ella hevur arbeitt innan økið.

Tú kemur at arbeiða í einum samskiftis- og tøknihúsi, sum hevur nakrar av teimum størstu og fremstu virkjunum í Føroyum í sínum kundaskara. Vit gera størri og smærri lýsingaátøk. Vit gera bløð, faldarar og aðrar prentlutir. Vit hava ment eina sera brúkaravinarliga CMS-heimasíðuskipan til internetið. Og vit hava okkara egna skeltaverkstað.

Í løtuni starvast 18 fólk á Sansum, sum eru í støðugum vøkstri. Umframt samskiparanum hava vit eisini søkt eftir einum fyriskipara og einum teknara.

Ljóðar samskiparin sum eitt starv fyri teg, so send eina umsókn við viðkomandi tilfari til okkara. Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú seta teg í samband við Høgna Rasmussen, stjóra á telefon 220401.

Seinasta freist at søkja starvið er 1. august 2005. Send umsóknina til: Sansir, Tinghúsvegur 47 Postboks 1099, FO-110 Tórshavn ella hognir@sansir.fo.

SANSIR

Postboks 1099, FO 110 Tórshavn, tel 355 355, faks 355 350, www.sansir.fo, info@sansir.fo